


# Bipper – ársins vørubilur

**Peugeot Bipper er eitt nýtt og spennandi tilboð á vørubilamarknaðinum. Bilurin er lættur at koyra og parkera. Í mun til støddina er hann óvanliga rúmligur, umframt at hann lýkur øll krøv til trygd og umhvørvisvernd**

Tað er ikki uttan orsøk, at Peugeot Bipper er kosin International Van of the Year 2009. Í grundgevingunum hjá dómsnevndini verður m.a. sagt, at talan er eitt nýtt og spennandi tilboð á evropeiska vørubilamarknaðinum. Bilurin er lættur at koyra og parkera, samstundis sum hann nøktar ein ávísan tørv hjá vinnukundum til smærri vørubilar. Í mun til støddina er hann óvanliga rúmligur, umframt at hann lýkur øll krøv til trygd og umhvørvisvernd.

Tað var á altjóða vørubilaframsýningini í Hannover í september 2008, at Peugeot Bipper varð kosin til ársins vørubil saman við Citroën Nemo og Fiat Fiorino, sum verða gjørdir á eini felags verksmiðju í Turkalandi.

Peugeot Bipper er væl egnaður sum arbeiðsbilur. Hóast hann er lítil uttan, er innrættingin sera liðilig við einum vørurúmi upp á 2,5 rúmmetrar sum kann økjast til 2, 8 rúmmetrar við at leggja høgra forsetur niður.

Peugeot Bipper er ein umhvørivsvinarligur bilur. Sum dømi kunnu vit nevna at Bipper við 1.4 HDi motori fæst við einum heilt nýggjum 2-Tronic girkassa við $CO_2$ útláti upp á einans 116 gr/km. Hann er eisini sera økonomiskur, oljunýtslan er 22 km/l.

**Prísir úr kr. 160.000**
**(uttan mvg. kr. 132.627)**

# Størri og rúmligari Partner



**Eftir 12 ár á marknaðinum er Peugeot Partner nú komin í eini heilt nýggjari útgávu, sum er bæði størri og rúmligari enn forgangarin. Bilurin er praktiskur og familjuvinarliga innrættaður**

Tann sera væl umtókti vøru- og familjubilurin Peugeot Partner er komin í eini í heilt nýggjari og størri útgávu.

Nýggi Partner er munandi størri enn forgangarin, og innrættingin er sera liðiligari við nógvum rúmum og hillum at leggja lutir frá sær á. Girstongin, sum nú er í instrumentborðinum, situr væl fyri og er løtt at handfara. Dragihurðarnar á báðum síðum eru stórar, og lætt er at koma inn og út úr bilinum. Eyðkenni fyri Partner er, at talan er um ein sera rúmligan bil í mun til støddina og ein væl egnaðan bil til barnafamiljur.

Designið á nýggja Partner er eisini meira aeorodynamiskt og tíðarhóskandi. Bilurin fæst eisini sum vørubilur. Partner fæst við 1,6 litra bensinmotori við 110 hk, og trimum 1,6 litra HDi dieselmotorum við ávikavist 75, 90 og 109 hk.

Peugeot Partner er ein vælkoyrandi praktiskur bilur við sera góðum plássi og er lættur at koyra og at umgangast í ferðsluni.

**Partner Van:**
**Prísir úr kr. 180.000**
**(uttan mvg. 150.247)**

**Partner Tepee:**
**Prísir úr kr. 210.000**

PEUGEOT OPEL SAAB NISSAN
P/F Auto Service · Undir Krákugjógv 19 · FO-100 Tórshavn
Tlf. (+298) 345400 · Telefax (+298) 345401 - 345402
Auto Service
www.autoservice.fo